Ferðaráð Føroya

Føroya Handilsskúli á Kambsdali og Ferðaráð Føroya skipað fyri tænastuskeiði til føroyska ferðavinnu.

## Tænasta í ferðavinnuni

**Endamál:**

- At geva starvsfólki innan ferðavinnuna eina grundleggjandi vitan um tænastuveiting
- At starvsfólkið verður ført fyri at meta um einstaka kundan og tillaga sína tænastu eftir honum
- At starvsfólkið fær eina fatan avhvussu umfatandi ferðavinna er
- At starvsfólkið sær týdningin í at kundatænastan hevur eitt javnt høgt støði í øllum liðum

**Innihald:**

- Ferðavinnuringrásin og ferðamaðurin
- Front - og backupstarvsfólk
- Samskifti – beinleiðis, óbeinleiðis og persónligt
- Eg/vit og málbólkurin
- Ymisk amboð at arbeiða út frá
- Samstarva við onnur lið í ferðavinnuringrásini

**Nær og hvar:**

| | |
|---|---|
| 29. apríl. 08.30 – 17.00 | Gistingarhúsið í Øravík |
| 6. mai. 09.00 – 18.00 | Hotel Føroyar |
| 20. mai. 09.00 – 18.00 | Handilsskúlin á Kambsdali |

**Kostnaður:**
kr. 500,- íroknað er drekkamuður og døgurði

**Tilmelding:**
Seinasta freist at melda til hvørt skeiði er soleiðis:
Øravík 26. apríl - Tórshavn 3. mai – Kambsdalur 17. mai
– allar dagar innan kl.12.00
Tilmeldingin er bindandi, tó treytað av at min.10 pers. melda seg til.

**Føroya Handilsskúli á Kambsdali**
FO-530 Fuglafjørður Tel 444900 Faks 444901 Teldupost fh@kambsdal.olivant.fo


# HEIMARØKTIN OG SERFORSORGIN
*SERSTOVNADEILDIN*

## Endurlýsing
# Leiðari til Sambýlið á Bóndaheygi í Tórshavn
## Farloyvisstarv

Innan Heimarøktina og Serforsorgina er eitt tíðaravmarkað starv sum leiðari á Sambýlinum á Bóndaheygi 14 leyst at søkja til setan skjótast til ber.

Starvið er tíðaravmarkað fram til 29. februar 2008.

**Sambýlið**
Sambýlið á Bóndaheygi er heim fyri fólk við serligum tørvi, umfatandi menningartarn og sálarsjúku. Á sambýlinum búgva í løtuni 5 fólk.

Sambýlið er karmur um heimalívið hjá húsfólkunum. Tey hava øll egna inntøku (pensión) og gjalda húsaleigu og allar vanligar húsarhaldsútreiðslur sjálvi.

Uppgávan hjá starvsfólkunum er at veita húsfólkunum stuðul og hjálp í teimum viðurskiftum í gerandisdegnum, sum tey, ikki megna at taka sær av sjálvi.

Á sambýlinum eru tilsamans 9 fólk í føstum starvi.

Sambýlið á Bóndaheygi hevur í ár eina játtan uppá uml. 3,5 mió kr.

**Starvið**
Leiðarin á sambýlinum hevur ábyrgdina fyri dagliga rakstrinum á stovninum. Hetta umfatar fakliga, fíggjarliga og fyrisitingarliga ábyrgd.

Lagt verður upp til, at leiðarin skipar sítt starv soleiðis, at hann/hon ikki er við í vaktarskipanini fyri stovnin.

Leiðarin á sambýlinum vísir til leiðaran fyri Serstovnadeildini, sum er deild undir Heimarøktini og Serforsorgini.

**Um leiðaran**
Tú skalt hava eina viðkomandi útbúgving innan sosialpedagogik og/ella –psykiatri og fakligan kunnleika til starvsøkið.

Vit vænta av tær, at tú hevur hug og hegni til at leiða, og at tú, við tínum leiðsluhátti, megnar at skapa trivnað og menning í starvsfólkabólkinum og á sambýlinum sum heild.

Vit vænta at tú hevur ávísan førleika innan roknskaparhald og at tú hevur hug og áræði at leggja afturat tíni vitan, tað sum krevst, fyri at kunna røkja leiðarastarvið til fulnar.

Harumframt vænta vit, at tú hevur evni og áræði at ganga nýggjar leiðir, og at tú hevur evni og vilja til at samstarva við starvsfelagar og leiðslu á øllum økjum.

Eisini vænta vit at tú ert sjónlig/ur í tínum leiðarastarvi og at tú dugir væl at lýsa tíni sjónarmið fyri øðrum.

**Um okkum**
Vit kunnu bjóða tær eitt spennandi og mennandi starv í einum fakliga krevjandi umhvørvi.

Harumframt bjóða vit tær eitt starv, har tú sleppur at taka lut í framtíðar menningini av serstovnaøkinum í tøttum samstarvi við starvsfelagar tínar á øðrum stovnum og leiðsluna fyri Serstovnadeildini.

Sum leiðari verður tú partur av einum leiðarabólki, sum er saman umleið 10 ferðir um árið.

Harumframt fært tú tilboð um at vera partur av einum supervisiónsbólki, har møguleiki er fyri at fáa stuðul og íblástur frá øðrum leiðarum undir Serstovnadeildini.

**Setan og løn**
Um pedagogur, ið frammanundan er tænastumaður verður settur í starvið heldur tænastumannasetanin fram, og verður lønin sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag á lønarstigunum 39, 41 og 43.

Annars verður starvið sáttmálasett og lønt samsvarandi stigunum 24, 26 og 28 sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag.

**Umsókn**
Vilt tú vita meira um starvið kanst tú venda tær til Jóanes N. Dalsgaard deildarleiðara á tlf. 304020.

Umsóknir við próvskjølum, viðmælum og CV skulu sendast til:

**Heimarøktin og Serforsorgin**
Serstovnadeildin
Eirargarður 2, 2. hædd
FO-100 Tórshavn

**Freistin at søkja starvið er hósdagin 27. apríl 2006.**


Starvslýsingar
á portal.fo

Kostnaður: (um lýsingin eisini er í Sosialinum)

| | |
|---|---|
| 1 vika | kr. 500,- |
| 2 vikur | kr. 750,- |
| til freistin at søkja er úti: | kr. 1.000,- |

Kostnaður: (um lýsingin ikki er í Sosialinum)

| | |
|---|---|
| 1 vika | kr. 750,- |
| 2 vikur | kr. 1.000,- |
| til freistin at søkja er úti: | kr. 1.250,- |

**2 lýsingar = -20% í avsláttri**
**3 ella fleiri = -30% í avsláttri**

Sosialurin
tel 341800 · fax 341801
teldupostur: lysing@sosialurin.fo

Koyri-kort?

Teoriskeiðið til persónbil, byrjar týsdagin **2. mai kl. 17.00**

Teoriskeiðið til lastbil og trailara, byrjar mikudagin **3. mai kl. 17.30**

FØRARASETRIÐ
KOYRISKÚLI

Stanley A. Olsen
koyrilærari
tel 21 10 99

John A. Christiansen
koyrilærari
tel 21 47 75

Jekaragøta 10 • Tórshavn